TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




# SKELTISREGLUGERÐ

## Tórshavnar kommuna

Hendan reglugerð er ikki galdandi fyri vegskelting








1.0 ENDAMÁL VIÐ REGLUGERÐINI s. 6

2.0 SKELTISHÆTTIR s. 7

3.0 ENDAMÁL VIÐ SKELTINUM s. 8

4.0 MEGINREGLUR FYRI SNIÐ, UPPSETAN OG STAÐSETING s. 9

5.0 ÓBYGT ØKI s. 14

# 0.0 >

# SKELTISLOYVI OG SKRÁSETING >

Sum meginregla skalt tú altíð søkja um skeltisloyvi (byggiloyvi), um tú ætlar at seta skelti upp. Tíðaravmarkað skelting krevur ikki skeltisloyvi men skal skrásetast hjá Tórshavnar kommunu áðrenn tað verður sett upp.

Allar umsóknir um at seta skelti og lýsingar upp, verða viðgjørdar við støði í m.a. almennu og serstøku byggisamtyktunum og skeltisreglugerðini.

Kommunan kann sýta fyri at góðkenna umsóknina, um ein góð heildarmynd ikki verður mett at spyrjast burturúr í mun til umhvørvið og heildarmyndina. Ein ítøkilig meting verður gjørd í hvørjum føri.

Verandi skermar og skelti, fáa loyvið at verða verðandi. Tó, skulu treytirnar, sum verða settar til ljósseting (fylgiskjal 1) lúkast. Tórshavnar kommuna setur eina skiftistíð upp á 1 ár, eftir at Skeltisreglugerðin er góðkend av Umhvørvis-málaráðnum, fyri nær allir skermar og skelti skulu vera umløgd til at lúka treytirnar fyri ljósseting.

**Hvar kann eg søkja?**
Søk um skeltisloyvi umvegis vangan.

Kort, sum vísir ásetingar fyri skelting fyri teir ymsu umráðispartarnar er at finna á www.torshavn.fo.

Kortið verður ikki tillagað verandi skermunum og skeltum, men fáa hesi eitt frávik frá Skeltis-reglugerðini. Verða skermarnir ella skeltini tikin niður (undantikið til umvæling og útskiftan), so fellur loyvið burtur

# 0.1 LESIVEGLEIÐING

HETTA ER EIN STUTT LESIVEGLEIÐING TIL SKELTISREGLUGERÐINA HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU. ÁSETINGARNAR Í SKELTISREGLUGERÐINI ERU RÓTFESTAR Í ALMENNU BYGGISAMTYKTINI, SUM ER TANN BERANDI OG YVIRSKIPAÐA ÆTLANIN, FYRI M.A. HVAR Í KOMMUNUNI EIN KANN BYGGJA. ALMENNA BYGGISAMTYKTIN VÍSIR SÍÐANI TIL SKELTISREGLUGERÐINA, SUM MEIRI NEYVT FER INN Á, HVUSSU SKELTINGIN SKAL SÍGGJA ÚT.

## **HVUSSU** LESI EG SKELTISREGLUGERÐINA?

Skeltisreglugerðin er ein ætlan, ið nágreinar, hvussu skelting í kommununi skal fara fram og hvussu skeltingarsniðið skal síggja út. Sum nevnt eru ásetingarnar fyri skelting rótfestar í Almennu byggisamtyktini.

Umráðispartarnir í almennu byggisamtyktini eru økir, ið eru ætlað ávísum virksemi, og hava byggiregulerandi ásetingar hesum viðvíkjandi. Almenna byggisamtyktin er býtt upp í ymiskar umráðispartar við ymsum nágreinaðum ásetingum. Eins og við ásetingunum um umhvørvisflokking verða ásetingarnar um skelting fyri viðkomandi umráðispartar í byggisamtyktini. Víst verður síðani til skeltisreglugerðina, ið m.a. nágreinar stødd, staðseting og snið av skeltum.

Eitt kort er knýtt til reglugerðina, soleiðis at borgarar á ein smidligan hátt kunnu síggja, hvørjar ásetingar eru á teimum einstøku økjunum í kommununi.

Skeltisreglugerðin er galdandi, frá tí degi hon verður samtykt í Umhvørvismálaráðnum.







**Skeltisreglugerðin er býtt upp í fimm partar:**

- **Endamál við reglugerðini**
  Í hesum partinum verður innihaldið í skeltisreglugerðini lýst, harumframt mannagongdir og leiðbeiningar.

- **Skeltishættir**
  Í hesum partinum verður skilað ímillum aktiv skelti og passiv skelti, ið eru ávikavist talgildir skermar og vanlig statisk skelti úr ymsum tilfari.

- **Endamál við skeltinum**
  Í hesum partinum, verða tey trý skeltissløgini, sum Tórshavnar kommuna loyvir, lýst. Hetta eru; Vinnu- og stovnsskelting, tænastuskelti, kunnungarskelti og lýsingarskelti.

- **Meginreglur fyri snið, uppsetan og staðseting**
  Í hesum partinum verða yvirskipaðir tættir innan snið, uppsetan og staðseting av skeltinum lýst umframt ymiskir háttir at skelta uppá, so sum húsaveggskelti, hangandi skelti, uppáklistrað vindeygu, vanlig og størri leys skelti, navnaskelti á bústaðarøki, tíðaravmarkað skelting, talgildir skermar og kunningarskelti.

- **Óbygt øki – 4. Grundumráði**
  Í hesum partinum verður undirstrikað, at skelting í 4. Grundumráði vanliga ikki eru loyvd.

**Góðan lesihug!**





1.0>

# ENDAMÁL VIÐ REGLUGERÐINI >

Endamálið við skeltisreglugerðini er at kunnað vinnu og borgarar í Tórshavnar kommunu um hvussu skelti skulu takað seg út so hesi ikki eru til ampa fyri nærumhvørvi. Hetta kundi t.d. verið við at venda talgildu skermarnar soleiðis, at tey í mest møguligan mun venda vekk frá bústaðarøkjum og at skeltini eru tillagað til tað umhvørvið, sum tey eri í. Sum til dømis, hvussu eitt skelti tekur seg út á einum húsavegi.

Reglugerðin skal eisini vera við til at varðveita órørda dámin í óbygdum øki, umframt at syrgja fyri at fólk ikki órógvast av skeltingini, men hinvegin fáa kunning á ein høgligan og tryggan hátt.

# 2.0>

# SKELTINGARHÆTTIR >

Í FYLGJANDI PARTI, VERÐUR SKILAÐ ÍMILLUM TVEIR HÁTTIR AT SKELTA UPPÁ. UNDIR TEIMUM BÁÐUM SKELTINGARHÁTTUNUM VERÐA YMSU SKELTINGARSNIÐINI REKSAÐ UPP.

Skilað verður ímillum aktiv skelti og passiv skelti.

**Aktiv skelti** eru skelti, har skap ella tekstur er myndað við ljósi, t.d. talgildir skermar. Hóast kunningin, ið verður víst á skíggjanum, er statisk, er hetta eitt aktivt skelti, tí at skíggin er talgildir. Eitt flættiskelti er eisini at skilja sum eitt aktivt skelti, tí myndin sjálvvirkandi skiftir við stuttum millumbili.

Tað finnast ymsir mátar at skelta við aktivari skelting:

Talgildir skermar so sum:

- Vanlig leys skelti
- Størri leys skelti
- Húsaveggjar skelti
- Skelti í vindeygum

**Passiv skelti** eru skelti, har skeltisflatan sjálv er statisk og ikki er úr ljósútbúnaði, men kann vera lýst á ella gjørt sjónligari við ljósi.

Tað finnast ymsir mátar at skelta við passivari skelting:

- Húsaveggjar skelti
- Hangandi skelti
- Uppáklistrað vindeygu
- Vanlig leys skelti
- Størri leys skelti
- Skelti – vinnuvirkir í privatum bústaði
- Navnaskelti í bústaðarøki



3.0>

# ENDAMÁL VIÐ SKELTINUM >

Í HESUM PARTINUM, VERÐUR ENDAMÁLIÐ VIÐ SKELTINGINI LÝST. ENDAMÁLIÐ HER ER AT LÝSA TEY YMISKU SKELTISSLØG, SUM TÓRSHAVNAR KOMMUNA LOYVIR.

**Vinnu- og stovnsskelting**
Er at skilja sum skelti, ið vísir heiti á vinnuvirki ella stovni á ognini, har virksemið fer fram. Vinnu- og stovnsskelting skulu verða passiv skelti.




**Tænastuskelti og kunningarskelti**
Er at skilja sum skelti, ið er sett upp til at kunna og vísa veg til eitt nú friðað øki, almenn øki, urtagarðsøki, spæliøki og tilíkt. Tænastu- og kunningarskelti skulu vera passiv sklelti.



**Lýsingaskelti**
Er at skilja sum skelti, bannarar og skermar, ið eru settir upp til at vísa tíðaravmarkaðar lýsingar, eitt nú tiltøk, framførðslur, valstríð, útsølur, ogn til sølu og tilíkt. Lýsingaskelti kunnu bæði vera aktiv og passiv.



4.0>

# MEGINREGLUR FYRI SNIÐ, UPPSETAN OG STAÐSETING >

**Pkt. 1. Yvirskipað**

- Tú skalt altíð søkja um skeltisloyvi, áðrenn tú setur skelti upp.
- Fyri talgildir skermar, hevur skeltiseigarin ábyrgdina av, at fáa gjørt mátingar av ljósstyrkini á skerminum og senda tær til kommununa til góðkenningar, sí vegleiðing í fylgiskjalinum aftast í reglugerðini.
- Vend tær altíð til kommununa, áðrenn tú keypir ella bíleggur skeltið.
- Tíðaravmarkað skelting krevur ikki skeltisloyvi, men skal skrásetast hjá Tórshavnar kommunu áðrenn tað verður sett upp.
  Sí **pkt. 11. Tíðararavmarkað skelting – lýsingarskelti.**
- Skeltiseigarin, hevur ábyrgdina av at skeltið er fest væl og at tað verður tikið niður, tá tað er liðugt lýst. Skeltiseigarin skal tryggja, at skeltið ikki ger skaða á fólk og lutir, t.d. tí tað fer í vindi.
- Skelting skal tillagast í mun til tað umhvørvi, sum tað verður sett í. Her verður serliga hugsað um støddarlutfall, lit, og ljósseting
- Skeltið skal altíð hugsast sum ein partur av heildini, tað verður sett í. T.e. húsaveggin ella øki.
- Ljósstyrkin á skermum skal sjálvvirkandi stillast sambært ljósstyrkina í umhvørvinum, tað er í ymsu tíðspunktini á døgninum sambært mátingum, ið eru gjørdar. Sí fylgiskal aftast í reglugerðini.
- Skelting fram við vegjaðara skal góðkennast av avvarðandi myndugleika.
- Á kunningar- og tíðaravmarkaðum skeltum skal kunning og grafiska dygdin verða so greið, at boðskapurin kann skiljast uttan at minka um ferðina í bili.
- Hvítt / neutralt kastljós kann varpast á skeltið, og skal tað stillast sambært ljósstyrkina í umhvørvinum, tað er í ymsu tíðspunktini á døgninum, sambært mátingum sum víst í fylgiskalinum aftast í reglugerðini

FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

# 4.1 LÝSING FRAMHALD

**Pkt. 2. Húsaveggjar skelti – Vinnu- og stovns-skelting**




- Hvør framsíða á vinnuvirki/stovni kann í mesta lagi hava eitt húsaveggjar skelti
- Framsíður, sum umsitingin í TK metir at verða óvanliga langar framsíður kunnu tó hava fleiri húsaveggjar skelti.
- Skeltingin skal ikki fjala byggilistarligu staklutirnar, eitt nú detaljur, vindeygu, hurðar, portur o.s.fr.
- Skelti skulu fyrst og fremst vísa á dyrnar ella høvuðsframsíðuna á bygningi
- Um fleiri vinnuvirkir/stovnar eru í sama bygningi skulu skeltini samskipast og hóska saman í skala, litbrigdi og sniði.
- Um fleiri skelti verða sett á ein húsavegg er týdningarmikið, at tey verða samskipað fyri at skapa eina góða heildarmynd.




- Dúkar/bannarar kunnu setast upp á húsavegg sum tíðaravmarkað skelting. **Sí pkt. 11. Tíðararavmarkað skelting – lýsingarskelti.**

**Pkt. 3. Húsaveggjar skelti í miðbýnum - Vinnu- og stovnsskelting**

- Sniðið á húsaveggjar skeltum í mið-býnum, skal vera útskornir bókstavir settir beinleiðis á húsaveggin ella á eina klára plátu. Detaljerað búmerki, kunnu skerast út, har tað ber til. Umsitingin metir í hvønn mun tað er møguligt at skera búmerki út.




- Hvítt / neutralt kastljós kann varpast á skeltið, ella setast aftan fyri bókstavirnar og skal ljósið stillast sambært ljósstyrkina í kringumstøðum ymsu tíðspunktini á døgninum, sum víst í fylgiskalinum aftast í reglugerðini.
- Skelti í miðbýnum, skulu ikki fara upp um takskeggið.




**Pkt. 4. Uppáklistrað vindeygu í miðbýnum - Vinnu- og stovnsskelting**

- Vinnuvirkir/stovnar, ið klistra við filmi/foliu á vindeygu í miðbýnum, kunnu í mesta lagi dekka 1/3 av hvørjum rúti.
- Øll vindeygu, ið ligga í veghædd, skulu verða gjøgnumskygd, hetta merkir at tað skal síggjast ígjøgnum uppáklistraða filmin/foliu.

**Pkt. 5. Hangandi skelti - Vinnu- og stovnsskelting**

- Hvør framsíða á vinnuvirki/stovni kann í mesta lagi hava eitt hangandi skelti. Framsíður, sum umsitingin í TK metir at verða óvanliga langar framsíður kunnu tó hava fleiri húsaveggjarskelti.
- Um fleiri skelti verða hongd á ein

bygning, er týdningarmikið at tey verða samskipað fyri at skapa eina góða heildarmynd.

- Hangandi skelti skulu ikki vera størri enn 0,5 $m^2$.
- Hangandi skelti skulu hava eina frástøðu á í minsta lagi 1,5 m frá grannamarki.
- Hangandi skelti skal hanga í minsta lagi 2,2 m yvir lendinum og í mesta lagi røkka 1 m út frá framsíðuni á bygninginum, og í minsta lagi 1 m frá koyribreyt og súkklubreyt (BK17:120).

**Pkt. 6. Vanlig leys skelti - Vinnu- og stovns-skelting**

- vinnurvirkir/stovnar kunnu seta eitt leyst skelti fyri hvørja ogn.
- Um fleiri vinnuvirkir/stovnar í sama bygningi vilja lýsa við leysum skeltum, skulu skeltini síggjast sum ein heild.
- Vanlig leys skelti skulu í mesta lagi vera 1,8 m høg, mált frá lendinum, og í mesta lagi 0,6 m breið.
- Leys skelti mugu ikki standa nærri enn 2,5 m frá grannamarkið.

**Pkt. 7. Størri leys skelti - Vinnu- og stovns-skelting**

- Hvørt vinnuvirki/stovnur skal ikki hava meira enn eitt stórt leyst skelti.
- Um fleiri vinnivirkir/stovnar í sama bygningi vilja lýsa við leysum skeltum skulu skeltini síggjast sum ein heild. Ein møguleiki er at seta eina felags skeltimastur ella eitt felags skelti upp. Hetta kundi verið ein ramma, har grundliturin er tann sami á øllum skeltum í somu rammu, og hvørt einstakt skelti kann í mesta lagi verða 1 $m^2$ til víddar við eini hædd á mesta lagi 1,5
- Størri leys skelti og skeltamastrar skulu í mesta lagi vera 4 m høg, mált frá lendinum, og í mesta lagi 1,5 m breið.
  - Í serligum førum, til dømis á økjum nærehendis innkomuvegir, kunnu skelti vera í mesta lagi 6 m høg, treytað av at tað hóskar til umhvørvið.

**Pkt. 8. Leys skelting í bústaðarøki - Vinnu- og stovnsskelting**

- Leys skelting fyri vinnuvirkir/stovnar í bústaðarøki, kunnu í mesta lagi vera 0,25 $m^2$ til víddar.
- Loyvi er at seta eitt leyst skelti á lendið á privatum stykki.
- Skeltið kann í mesta lagi vera 0,9 m høgt, mált frá lendinum.
- staðseting av skeltinum má ikki verða til ampa fyri útsýni hjá ferðsluni

**Pkt. 9. Húsaveggjarskelting í bústaðarøki - Vinnu- og stovnsskelting**

- Húsaveggjarskelti fyri vinnivirkir/stovnar í bústaðarøki, kunnu í mesta lagi vera 0,25 $m^2$ til víddar.
- Sniðið á húsaveggjarskeltum í bústaðarøkjum, skal vera útskornir bókstavir settir beinleiðis á húsaveggin ella á eina klára plátu. Detaljerað búmerki, kunnu skerast út, har tað ber til. Umsitingin metir í hvønn mun tað er møguligt at skera búmerki út.

**Pkt. 10. Navnaskelti í bústaðarøki**

- Leyst skelti kann í mesta lagi vera 2 $m^2$.
- Leyst skelti skal setast við innkoyring/atkomuveg til bústaðarøkið. Eru fleiri atkomuvegir til bústaðin, kann eitt skelti setast við hvønn atkomuveg.



**Pkt. 11 Tíðararavmarkað skelting – lýsingarskelti**

- Skelti ella dúkar við lýsingarskeltum, fyri eitt nú serlig tiltøk kunnu hanga í mesta lagi í 6 vikur.
- Valplakatir kunnu tó hanga í 4 vikur.
- Allar plakatir og lýsingar skulu takast burtur, dagin eftir at tiltakið, ið verður lýst ella kunnað um, er liðugt. Um hetta ikki verður gjørt, verða tey tikin burtur fyri rokning ábyrgdarans.
- Staðseting av skeltinum má ikki verða til ampa fyri útsýni hjá ferðsluni.
- Dúkar kunnu heingjast á húsaveggir til serlig høvi, til dømis til býarveitslur, festivalar og størri ítróttartiltøk. Dúkar skulu lagast til støddina á húsavegginum og setast væl og virðiliga fast, eitt nú í rammu.
- Í sambandi við sølu av fastari ogn, kann bert eitt lýsingarskelti verða sett á stykkið ella bygningin. Skeltið skal ikki vera størri enn 1 m² til víddar.
- Viðmælt er at nýta burðardygt ella endurnýtiligt tilfar til skeltingina ella sjónvarpsskíggjar.

**Pkt. 12. Talgildir skermar – Lýsingarskelti**

- Eftir at talgildi skermurin er settur upp, skulu mátingar gerast av ljósstyrkini, og skermurin skal stillast eftir hesum, sí fylgiskal aftast í reglugerðini.
- Ljósstyrkin verður mátað í eindini Footcandles (fc), og skal munurin á ljósstyrkini á skerminum og ljósstyrkini í umhvørvinum ikki vera meiri enn 0,3 fc, sí fylgiskal aftast í reglugerðini.
- Fyri at endaligt skeltingarloyvi kann latast, skulu mátingarnar verða sendar Tórshavnar kommunu til góðkenningar.
- Skermurin skal hava ein følara, sum sjálvvirkandi stillar ljósstyrkina svarandi til ljósstyrkina í umhvørvinum ymsu tíðspunktini á døgninum.
- Myndin skal ikki flyta seg ella bleiktra, og liturin má ikki vera ov bjartur.
- Skiftið millum lýsingarnar skal fána líðandi fyri at sleppa undan ljósbleiktran.
- Tá talan er um lýsingar, sum skifta í liti v.m., kann talan vera um ljósdálking, og tá kann Tórshavnar kommuna seta tillagandi krøv, soleiðis at lýsingin ikki er til ampa.
- Tíðarbilið frá, at fyrra myndin á skerminum er týðilig, til at næsta myndin á skerminum er týðilig, skal í mesta lagi vera 1 sekund.
- Lýsingateksturin skal vera stuttur og greiður. Tað skal vera skjótt og lætt at lesa úr koyrandi bili.
- Skermurin skal vendast burtur frá bústaðarøkjum.
- Hvør lýsing skal vera á skerminum í minsta lagi 6-10 sekund, áðrenn myndin skiftir. Um fleiri lýsingar eru á einum teini, skulu lýsingarnar vera á skerminum í minsta lagi 10 sekund, áðrenn myndin skiftir.




**Pkt. 13. Tænastuskelti - vegvísing**

- Skeltið skal einans hava yvirskipað heiti á, til dømis farstøð, viðarlund, hotel, listasavn ella tílíkt.
- Lýsast skal við góðkendari myndatalvu, sí §30 í lóg um ferðslumerkingar, ið ásetur krøv um góðkendar myndatalvur.
- Tað er ikki loyvt at seta búmerki, lýsing ella tílíkt á tænastuskelti.

**Pkt. 14. Kunningarskelti**

- Stovnar og áhugafeløg kunnu seta kunningarskelti upp, ið eitt nú lýsa farleiðir ella kunna um ávís støð.
- kunningarskelti skal tillagast í mun til tað umhvørvi, sum tað verður sett í. Her verður serliga hugsað um

støddarlutfall, lit, og ljósseting

- Umsitingin ger eina ítøkiliga meting av hvørjum einstaka kunningarskelti
- Skeltið skal altíð hugsast sum ein partur av heildini, tað verður sett í. t.e. húsaveggin ella øki.
- Avsendarin av kunningini skal verða nevndir á skeltinum.

5.0>

# ÓBYGT ØKI – 4. GRUNDUMRÁÐI >

Landslag og útsýni skulu ikki órógvast av lýsingum. Tí er bannað at skelta í óbygdum øki. Tó eru ávís undantøk fyri kunningarskelting, tænastuskelting og vinnu- og stovnsskelting í óbygdum øki, ið kunnu fáa loyvi til at seta skelti á bygningar ella nærhendis. Skeltið skal ikki skara fram úr landslagnum ella vera sjónligt langt burturfrá. Ein ítøkilig meting verður gjørd í hvørjum einstøkum føri.

# FYLGISKAL

# UTTANDURA MÁTINGAR AV TALGILDUM SKERMUM

**Uttandura mátingar av Foot-candles**
Eftir at talgildi skermurin er settur upp, er neyðugt at meta um ljósstyrkina á skerminum, soleiðis at tað ikki órógvar umhvørvið og ferðsluna í økinum. Mátingarnar av ljósstyrkini eru grundaðar á ein Foot-candle (fc) stiga, ið er ein eind, ið lýsir ljósstyrkina ella luminansin, sum skermurin sendir út.

- Fyrsta máting verður gjørd við at avbyrgja ljósið, ið skermurin sendir út. Hetta kann gerast við einum støddarhóskandi petti av svørtum pappi, klæði ella líknandi, ið kann fjala talgilda skermin, soleiðis at einans ljósið frá umhvørvinum rakar mátaran. T.d. ferðsluljós, ljós frá landslagnum, húsum, handlum og lyktapelum.

- Seinna máting verður gjørd uttan at fjala skermin, soleiðis at ljós frá skerminum eisini rakar mátaran.

Um munurin millum fyrstu og aðru máting er 0.3 fc ella minni, er ljósstyrkin á skerminum í lagi. Hetta virðið er sett sum eitt loyvt frávik.

**Mannagond fyri máting**
1. Persónur 1, sum ger mátingina, skal hava frástøðu til skermin sum víst á talvuni niðanfyri:

| Stødd á skermi | Frástøða |
|---|---|
| 3x6m | 45m |
| 3x10m | 60m |
| 4x14m | 75m |
| 6x18m | 105m |

2. Persónur 2, sum avbyrgir ljósið við einum støddarhóskandi petti av svørtum pappi, klæði ella líknandi, skal standa 2-3 metrar frá ljósmátaranum.

3. Persónur 1 skal halda ljósmátaran í eini hædd upp á umleið 1,7 metrar frá jørðini og peika beint ímóti skerminum.

4. Tá ið fc-virðið frá ljósmátingini er funnið, verður virðið upp á 0.3 fc lagt aftur at mátingini sum eitt loyvt frávik. Soleiðis verður maksimala ljósstyrkin í júst hesum økinum funnin. T.d. um fyrsta ljósmáting gav eitt virði upp á 2.3 fc, er maksimala ljósstyrkin, ið skermurin í økinum kann hava, 2.6 fc.

5. Persónur 2 tekur burtur avbyrgingina, soleiðis at ljósið frá skerminum er frítt og rakar ljósmátaran.

6. Máta síðani ljósið í 3 til 5 minuttir fyri at síggja, um virðið heldur seg niðan fyri ella oman fyri maksimala virðið. Fer virðið upp um tað maksimala, er ljósstyrkin ikki í lagi, og hinvegin heldur virðið seg undir tað maksimala, er ljósstyrkin í lagi.

# FYLGISKAL

**Máting av footcandle frá umhvørvinum**



Tað er týdningarmikið, at einans ljós frá umhvørvinum rakar mátaran.

**Máting av footcandle frá skerminum**



Skermurin skal stillast soleiðis, at hann vísir eina hvíta mynd. Um tað ikki er gjørligt at fáa eina hvíta mynd, skulu allar lýsingarnar á skíggjanum mátast fyri at staðfesta, at tær ikki fara upp um málda fc í umhvørvinum, tvs. maksimala fc-viðrið.


HANDIL